# Avreiddu fyri 99 milliardir

Íslendsk fiskiskip avreiddu í fjør fyri 99 milliardir íslendskar krónur samanborið við 80 milliardir í 2007. Sostatt vaks avreiðingarvirðið heili 23,5 prosent. Tøl hjá hagstovuni í Reykjavík vísa, at avreiðingarvirðið á bornfiski var 70 milliardir krónur í fjør ella 15,8 prosent meiri enn árið fyri. Flatfiskur bleiv avreiddur fyri 6,6 milliardir krónur og uppisjóvarfiskur fyri 21 milliardir krónur. Virkir keyptu fisk fyri 37 milliardir krónur beinleiðis frá skipum, fiskur fyri 13 milliardir fór um marknaðin til virkingar innanlands, óvirkaður fiskur fyri 12 milliardir fór av landinum, og skip, sum virkaðui fiskin umborð, avreiddu fyri 34 milliardir krónur.



# Vilja arbeiða hjá Vestas

Tað stendur ikki á hjá donsku vindmyllufyritøkuni Vestas at fáa nóg mikið av fólki til at arbeiða á nýggja virkinum, sum fyritøkan byggir í amerikanska statinum Colorado. Eftir ætlanini skulu 400 fólk arbeiða á virkinum, men longu nú hava meiri enn 3.000 fólk søkt um arbeiði, skrivar Ritzau. Um vikuskiftið skipaði Vestas fyri einum kunningarfundi fyri áhugað, men tað vísti seg, at pláss var ikki fyri øllum í fundarhølinum, og tí verður tiltakið endurtikið. Nógv av teimum, sum søkja um arbeiði hjá Vestas í Colorado, hava mist arbeiði í olju- og gassídnaðinum har.

seta búgv her, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Kommunan útstykkjaði fyri einari tíð síðani 11 grundstykkir, og av teimum eru eini fýra eftir enn. Men eisini er stykkjað út til summarhús.

– Ja, eftirspurningurin eftir summarhúsum var rættiliga stórur. Fólk ringdu og spurdu eftir grundstykkjum til summarhús, so kommunan stykkjaði seks stykkir út, og tey blivu øll rivin burtur, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Eini hús eru bygd, eini onnur standa í gerð, meðan eini triðju eru planerað og klár til bygging.

Skálavík hevur eisini síni arbeiðspláss.

– Vit hava eina deild hjá Rúsdrekkasøluni her í bygdini. So hava vit ellisheimið, vit hava ein skúla og ein barnagarð. Ein bóndi er eisini í bygdini, og kommunan hevur ein mann í fulltíðarstarvi sum umsjónarmann. Annars arbeiða fleiri skálvíkingar í Havn og ferðast ímillum, eins og nøkur arbeiða á flakavirkinum í Skopun, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

## Navnframir menn

Flakavirkið á Sandi er ikki opið meira, og har arbeiddu nøkur fólk úr Skálavík, og kommunan merkir í heila tikið, at tíðirnar ikki eru tær somu.

– Ja, kommunukassin merkir, at tíðirnar eru verri. Í januar og februar hava vit fingið 100.000 krónur færri inn í skatti báðar mánaðarnar, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Men fær Skálavík færri pengar í kassan, so er bygdin kortini rík upp á kendar føroyingar, sum har eru fostraðir.

– Ja, vit eiga nógvar kendar persónar. Heðin Brú stavar higani, Kristian Oswald Viderø er ein annar, Hans á Mølini kunnu vit nevna. Vit eiga eisini fleiri kendar skiparar, so sum Eiler Jacobsen og bróður hansara, Sámal. So vit eiga nógvar navnframar menn – og kvinnur við, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Og júst Eiler Jacobsen hevur eina rættiliga stóra verkætlan í gongd í Skálavík.

– Har gongur væl so vítt eg skilji. Økið er liðugt planerað og tað skuldi verið klárt at fari undir byggingina um ikki so langa tíð, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Eisini í Skálavík hevur verið tosað leystliga um samanlegging, men einki ítøkiligt er komið burtur úr enn.

– Nú eri eg sjálvur so nýggjur í kommununi, men tað hava so ongar ítøkiligar samráðingar verið um tað enn. Men tað er so nakað, sum kemur fyrr ella seinni, antin vit so vilja tað ella ikki, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Men samstarv er longu millum kommunurnar í oynni.

– Ja, vit hava eitt samstarv um Meginskúlan inni í Dal, vit samstarva um barnaverndartænastuna, um ellisheimini í oynni og læknamiðstøðina heima á Sandi. So tað er rættiliga nógv samstarv millum kommunurnar, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Somuleiðis hevur verið eitt samstarv við dagtilhaldinum, men nú landið hevur skorið stuðulin burtur, er ikki greitt, hvussu verður við tí. Skálavíkar kommuna hevur ikki enn tikið nakra endaliga støðu til hetta.

– Dagtilhaldið heldur fram og Sands kommuna og Húsavíkar eisini hava gjørt av at vilja halda lív í hesum, men vit hava sum sagt ikki tikið nakra endaliga støðu til hetta enn, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

## Teir vóna

Eins og flestu aðrar bygdir á Sandoynni hevur Skálavík sín egna barnaskúla, men hvussu nógv børn ganga har?

– Tað liggur um 14 børn, og tey ganga frá fyrsta til fimta flokk, síðani fara tey í Meginskúlan á Sandi at ganga víðari, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Bygdin hevur eisini ein barnagarð, ið jú sum kunnugt er nærum eitt fólkakrav, at einhvør bygd hevur.

– Jú, vit hava barnagarð eisini í bygdini, men í løtuni eru bert trý børn í honum, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Og so til tað, sum upptekur sandoyingar mest í hesum árum, nevniliga undirsjóvartunnilin. Hvussu eru vónirnar hjá skálvíkingum um, at hann fer at koma?

– Jú, sjálvandi, man vónar altíð, men tað sær ikki alt for gott út í hesum krepputíðum. Nú skulu teir so taka hesa lógina um, at byrjast skuldi 1. november av, men vit hava kortini góðar vónir. Hann fer at hava alstóran týdning fyri bygdina og ikki minst fyri oynna, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

## Depilin hjá Eiler týdning

Ein avleiðing av øllum tosinum um undirsjóvartunnil er útstykkingin, sum er farin fram í øllum kommunum á Sandoynni, og eisini í Skálavík lótu tey seg ríva við av teirri framtaksbylgju, sum dró um alla oynna.

– Eftirspurningurin eftir grundstykkjum vaks munandi, tá tosið um undirsjóvartunnilin var upp á tað mesta. Alt var ógvuliga positivt tá, og tað var eisini fremsta grundin til, at vit fóru undir hesa útstykkingina, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Hetta bjartskygni, sum tosiðumundirsjóvartunnilin bar við sær, smittar eisini av sær á varaborgarstjóran.

– Eg síggi ljóst upp á framtíðina. Tað nyttar heldur einki at síggja svart upp á tað, og eg ivist onga løtu í, at einari bygd sum Skálavík er lív lagað, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Eitt annað, sum eisini hevur týdning fyri framtíðina hjá Skálavík, er verkætlanin hjá Eiler Jacobsen.

– Ja, hon kann koma at hava stóran týdning fyri bygdina. Hon fer at skapa nøkur arbeiðspláss, tá byggingin byrjar, og eisini eftirfylgjandi, tí tað skulu eisini fólk til at taka sær av hesum deplinum, og tað verða fólk úr bygdini, kundi man hugsað sær, sigur Arnbjørn Bjarnarson.

Hann viðgongur, at bygdin missir ein stóran part av yngra ættarliðinum, tá tey eru liðug við útbúgvingina, tó at tey eru røsk at vitja aftur.

– Loysnin er, at undirsjóvartunnilin kemur. Og tá hann kemur, fara ungu fólkini eisini at seta búgv her suðuri. So hann er alt avgerandi fyri framtíðina hjá Skálavík og hjá oynni sum heild, metir Arnbjørn Bjarnarson, varaborgarstjóri í Skálavíkar kommunu.



*Nýggja grótkastið er ein beinleiðis avleiðing av stóru ódnini 31. januar í fjør, sum gjørdi stóran skaða á alt havnarlagið í Skálavík*